Trupult at fylgja við

Peter Duetoft úr CD og Pia Larsen úr Vinstra halda tað vera trupult at fylgja við í skiftandi útspælunum frá landsstýrinum eftirhondini. Peter Duetoft heldur ikki, at landsstýrið hevur broytt kós í mun til upprunaligu ætlanina, meðan Pia Larsen heldur, at hendan kósin er meira hóvlig.

SAMGONGUAVTALAN
Magnus Dam, Keypmannahavn

– Eftirhondini halda eg, tað er vorðið trupult at fylgja við í føroyskum politikki. Tað er fyrsta viðmerkingin hjá Peter Duetoft, formanni í Føroya-nevndini, til uppskotið, sum landsstýrið nú hevur lagt á borðið.

Hann var ein teirra, sum ikki lat serliga væl at ætlanini hjá landsstýrinum um at halda eina fólkaatkvøðu 26. mai, tí eingin avtala liggur á borðinum millum landsstýrið og stjórnina. Og eins og flestallir av hinum politikarunum á Christiansborg hevur Peter Duetoft tikið undir við einari fýra ára skiftistíð, um Føroyar fara úr ríkinum.

Uttan at kenna allar smálutirnar í nýggjasta uppskotinum, so heldur Peter Duetoft ikki, at landsstýrið hevur flutt seg serliga langt frá upprunaligu ætlanini um fullveldi.

– Í mínum eygum eru vit nú aftur í einari støðu, har landsstýrið ynskir at samráðast um fullveldi. Og har hava vit higartil sagt, at skiftistíðin verður fýra ár, sigur Peter Duetoft og letur skilja, at nýggja ætlanin hjá landsstýrinum helst ikki fer at broyta uppá hesa støðuna.

Peter Duetoft heftir seg við, at talan er um eina fullveldisætlan, og at ætlanin er einaferð í framtíðini at hava eina fólkaatkvøðu um fullveldi. Tað er hetta, sum nívir hann. Ynski um fullveldi verður ballað inn í nakrar orðingar um yvirtøkur og um at minka blokkstuðulin eftir einari skipaðari ætlan.

– Málið er framvegis fullveldi, staðfestir Peter Duetoft. Spurdur, um føroyingar als ikki skulu hugsa um fullveldi, sigur hann, at sjálvandi skulu føroyingar tað.

Peter Duetoft, formaður í Føroya-nevndini

– Men mann skal siga tað, sum tað er, sigur formaðurin í Føroya-nevndini. Hann fer nú at kalla saman til fundar í Føroya-nevndini og heita á danska forsætisráðharran um at greiða frá nýggja útspælinum frá landsstýrinum. Hesin fundurin verður helst síðst í næstu viku ella í aðru viku.

Nyrup ikki at hitta

Sosialurin royndir at fáa eina viðmerking frá danska forsætisráðharranum til útspælið frá landsstýrinum, men forsætisráðharrin var upptikin, og hetta eydnaðist tískil ikki.

Higartil er tað Nyrup, sum hevur fingið skyldina fyri, at allar ætlanirnar hjá landsstýrinum eru kollsigldar, og tað verður helst hann, sum einaferð seinni í ár skal samráðast við landsstýrið um at minka blokkstuðulin og yvirtaka málsøkini, sum ætlanin er at yvirtaka 1. januar. Tað verður helst eingin trupulleiki at gera eina avtalu um, at blokkstuðulin skal minka, men spurningurin er, hvussu nógv ár fram í tíðina, hendan avtalan røkkur.

Meira hóvlig kós

Og spurningum eru tað ovmikið av, heldur Pia Larsen úr Vinstra, sum eisini er limur í Føroya-nevndini.

– Talan er um eitt uppskot til samtyktar, og tað bindir ikki komandi landsstýri meira enn so, at ætlanin kann broytast aftur. Eingin veit, hvør situr í landsstýrinum aftana eitt komandi løgtingsval. Ynskir tað landsstýrið at halda fram við ætlanunum at minka blokkin, og tekur tað landsstýrið yvirhøvur undir við hesari ætlanini, sum nú liggur á borðinum, spyr hon.

– Tað eru so nógvir ógreiðir lutir í hesum, sigur Pia Larsen, sum kortini heldur, at uppskotið í fyrstu atløgu tykist meira hóvligt enn uppskotið frá 1. februar.

– Sum eg dugi at síggja tað, roynir landsstýrið nú at venda aftur til tær samráðingarnar, sum vóru millum føroysk og donsk embætisfólk um at broyta heimastýrislógina og gera tað lættari at yvirtaka málsøki. Tað er positivt, heldur hon.

Meðan Peter Duetoft heldur, at landsstýrið við hesari ætlanini heldur fram við beinari kós móti fullveldinum, heldur Pia Larsen altso, at talan er um eina samráðingarkós innanfyri ríkisfelagsskapin.

Tey bæði gera kortini vart við, at tað ikki ber til at taka eina endaliga støðu fyri ella ímóti ætlanini, fyrrenn Føroya-nevndin er kunnað um hana.

Skattalætti til tey hægstløntu

– Tey, sum fara í barnsburðarfarloyvi, mugu fáa so mikið útgoldið, at tey fáa lívbjargað sær, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag

BARNSBURÐARGRUNNUR
Áki Bertholdsen

– Hetta er ikki annað enn ein skattalætti til tey hægstløntu.

Tað heldur Ingeborg Vinther, forkvinnaí Føroya Arbeiðarafelag um ætlanina at broyta barnsburðargrunnin.

Í ársfrágreiðingini, sum hon legði fyri aðalfundin hjá felagnum í gjár, vísti hon á, at í løtuni er tað dagpeningalógin , sum m.a. er grundarlagið undir teimum veitingum, sum tey fáa, ið eru í barnsburðarfarloyvi.

– Hetta verður fíggjað um skattin, soleiðis at tey, sum hava størstu inntøkuna, gjalda meira til hesa skipan, enn tey, sum hava lægri inntøku.

Ingeborg Vinther helt, at hetta er ein skilagóð skipan, men kortini tekur Føroya Arbeiðarafelag undir við at dagføra lógina, soleiðis at tey, sum eru í barnsburðarfarloyvi, fáa so mikið útgoldið, at tey megna at lívbjarga sær fíggjarliga, hóast tey ikki fáa røkt arbeiði sítt.

– Nú hevur so samgongan lagt uppskot fyri tingið um nýggja lóg um veitingar í sambandi við barnsburð. – Men men hetta er eitt lógaruppskot, sum leggur upp til eina heilt aðra skipan, har løntakarin sjálvur skal gjalda stóran part av útreiðslunum til henda barnsburðargrunn. Og uttan mun til inntøku skulu allir løntakarar gjalda sama prosentgjald av lønini í grunnin.

– Hetta merkir, at tann, ið hevur eina ársinntøku upp á 800.000 krónur skal gjalda sama prosent til grunnin, sum tann, ið hevur 180.000 krónur í ársinntøku.

Ingeborg Vinther sigur, at sum skattaskipanin og dagpeningalógin nu eru, rindar tann, sum hevur 800.000 krónur í ársinntøku lutfalsliga størri part av inntøku síni í skatti til t.d. at gjalda dagpening við, enn tann við lægri lønum.

– Uppskotið, sum samgongan hevur lagt fyri tingið um barnsburðargrunn, er ikki annað enn ein skattlætti til tey hægstløntu sigur Ingeborg Vinther. Á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag í gjár, legði hon ársfrágreiðingina fram

Mynd: Jens K. Vang

– Við tí nýggja lógaruppskotinum, leggur samgongan tí í veruleikanum upp til ein skattalætta fyri tey hægstløntu, tí nú sleppa tey frá at gjalda lutfalsliga størri part av útreiðslunum til veitingar í sambandi við barnsburð.

– Lógaruppskotið leggur harafturat upp til, at tey, sum hava upp 35.000 krónur í mánaðarløn, skulu hava fult endurgjald, tá tey fara í barnsburðarfarloyvi, og hetta kann ikki annað enn undra vanliga løntakaran, táið vit samstundis síggja, at tey arbeiðsleysu bert kunnu fáa upp til 80% av einari vanligari arbeiðsmannaløn, sigur Ingeborg Vinther í ársfrágreiðingini.

Samgongan er samd

Teir tríggir samgonguleiðararnir eru nú vorðnir samdir um ein sjálvstýrisleist, ið líkist nógv tí, sum boðaður varð frá 1. februar

Samgongan er nú samd um ein leist fram móti føroyskum fullveldi. Klokkan tvey fríggjanáttina skrivaðu leiðararnir fyri teir tríggir samgonguflokkarnar undir eina avtalu um eitt uppskot til samtyktar um at yvirtaka eftir føstum leisti

SAMGONGUSEMJA
John Johannessen

Einki lógaruppskot um bundnan sjálvstýrisleist kemur fyri løgtingið frá sitandi landsstýri.

Hetta er úrslitið av drúgvu telvingini millum teir tríggjar samgonguflokkarnar, ið hevur verið síðani løgmaður á samgongufundi fríggjadagin 23. februar boðaði hinum samgonguflokkunum frá, at hann ikki longur tók undir við, at fólkaatkvøða skuldi vera um eitt lógaruppskot um ein bundnan sjálvstýrisleist fram móti fullveldinum.

Kortini fastur leistur

Fríggjanáttina klokkan tvey skrivaðu Anfinn Kallsberg, Høgni Hoydal og Helena Dam á Neystabø undir eina avtalu um at leggja fyri tingið eitt uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrið at fylgja einum føstum sjálvstýrisleisti.

Eitt slíkt uppskot er ikki bindandi, men áleggur kortini landsstýrinum eina ávísa skyldu, tá ein meirirluti í tinginum við uppskotinum heitir á landsstýrið at fremja eina ætlan.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, var longu liðugur við nýggja uppskotið í gjár, og varð tað tí eisini borið í Løgtingsskrivstovuni í gjár. Innihaldið í uppskotinum er nærum tað sama, sum tað var í lógaruppskotinum, sum skuldi samtykkjast við fólkaatkvøðu 26. mai.

Nýggja semjan leggur upp til, at øll málsøki uttan ríkismál, skulu yvirtakast eftir einari fastari ætlan fram til 2012. Tá øll málsøki eru yvirtikin og ongar búskaparligar bindingar eru millum Føroyar og Danmark skal síðani fólkaatkvøða vera um føroyskt fullveldi.

Byrja beinan vegin

Samgongan miðar í nýggju semjuni eftir, at tað beinan vegin skal farast í gongd við at yvirtaka. Ætlanin er, at heili tíggju málsøki skulu vera yvirtikin longu áðrenn 1. januar 2002. Hesi málsøki eru fólkakirkjan, skúlamál, revsirættarmál, persónsrættarmál, húsfólkarættarmál, arvarættarmál, fíggjarrættarmál, havumhvørvisvernd, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar og Vága Floghavn.

Løgverja, gjaldoyramál, peningamál, fíggingarvirksemi, sjóvinnumál, flogferðslumál, korlegging og fjarskiftismál skulu undir føroyskt málsræði innan 2006, og innan 2008 skulu tilbúgving og heilsumál vera yvirtikin.

Samgongan ætlar, at danska ríkisveitingin skal minkast burt stig fyri stig eftir einari fastari ætlan. Men longu 1. januar í 2002 skal blokkstuðulin minka 300 milliónir krónur, sum er ein triðjingur av blokkinum. Hesum er andstøðuleiðarin Jóannes Eidesgaard hart ímóti. Hann skýrir tað beinleiðis óseriøst. Men teir tríggir samgonguleiðararnir halda hetta vera ábyrgdarfult, tí føroyski búskapurin tolir tað væl.

Ætlanin er, at ein búskapargrunnur skal setast á stovn, sum skal tryggja ein sjálvberandi búskap.

Ásanna sjálvsavgerðarrættin

Ein av ósemjunum í samgongustríðnum, sum hevur leikað á seinastu tíðina, var, um løgtingið skuldi staðfesta, at Føroyar hava sjálvsavgerðarrætt. Eitt slíkt uppskot vildi Fólkaflokkurin ikki hava fyri tingið.

Men samgongan er nú vorðin samd um, at uppskotið til samtyktar skal byrja við, at løgtingið ásannar, at føroyingar hava sjálvsavgerðarrætt. Tískil samtykkir løgtingið ikki sjálvsavgerðarrættin, men staðfestir hann sum eina sjálvfylgju.

Nýggi leisturin hjá samgonguni kemur helst fyri tingið einaferð í næstu viku.

Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin
Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin
ROYN HENDAN SERA VÆLUMTØKTA BILIN
< < < Nakrir eftir til gamlan prís > > >
KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar
Familju - camping - firmabilur- og sum Taxa
Fæst eisini sum vøruvognur
EINANS 198.800,-

Multibilurin til einhvørja loysn
Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútur í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós , kúfangarar / spegl í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinun v.m.
3 ára garanti/100.000 km. garanti
EINANS 239.800,-

Sosialurin - 311800
Rætti bilurin til mong endamál. –Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.
D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 310600